


***Nr. 11*** ***17. mai 2020*** ***80. árg.***

# Jesus er hin góði hirðin

*Gunnar Jeppestøl*

Um øll fólk høvdu sæð, hvør ið Jesus er, so høvdu øll sagt ja til hansara. Tey siga nei, av tí at tey ikki hava sæð og skilt, hvør ið Jesus er. Djevulin hevur blindað tey. Trupulleikin er, at tey hava eina skeiva gudsmynd.

Vit prædikumenn mugu spyrja okkum sjálvar: Boða vit Jesus ella alt annað, sum er kring hann? Hann, sum lurtar, má sita eftir við einari jaligari mynd av Jesusi. Tað er hann, sum tað snýr seg um. Bíblian sigur í Matt. 9,36: „Tá ið hann sá mannamúgvurnar, tókti honum stórliga synd í teimum, tí at tær vóru illa viðfarnar og vanrøktaðar rætt sum seyðir, ið ongan hirða hava."

Jesus elskaði síni til tað síðsta. Jesus sá fólkið. Mong okkara millum líða av tómleika og brotnum lyftum. Tað er eitt róp í fólki og ein longsul eftir hjálp. Tey eru sum seyðir uttan hirða, men Jesus vil, at øll skulu eydnast. Hann elskar øll, sum tað framgongur í Jóh. 13,1: „Líka sum hann hevði elskað sínar egnu, sum vóru í heiminum, soleiðis elskaði hann teir líka til endan."

Jesus elskaði Pætur, hóast hann sveik. Hann elskaði Judas líka til ta løtuna, hann doyði. Jesus elskar teg, sjálvt um tú hevur gingið á skeiva vegi. Hann elskar teg treytaleyst. Jesus elskar okkum ikki vegna tað, vit hava gjørt, men vegna tað vit eru.

Summi bera ein ótta í sær, men Jesus elskar okkum. „Ótti er ikki í kærleikanum, men hin fullkomni kærleikin rekur út óttan," sum skrivað stendur í 1. Jóh. 4,18. Bíblian sigur, at hann elskaði okkum, meðan vit enn vóru syndarar. Róm. 5,8. Hann hevur vaskað okkum rein í blóði sínum. Kom tí til hansara og

bjóða honum inn í hjarta títt og sig honum takk fyri ta stóru frelsu, hann hevur vunnið tær á krossinum.

*Effie Campbell* umsetti.

# Bara 0,2%

Hvussu kunnu 0,2% vælsigna alla jørðina? Um tú ikki lurtar væl eftir, so kann hetta ljóða niðrandi. Lat meg siga beinanvegin, at tað er IKKI mín ætlan.

Mín ætlan er at vísa Guds trúvirði móti tí lyfti, hann gav Ábrahami í 1. Mós. 12,3: „Allar ættir jarðarinnar skulu fáa signing av tær."

Stutt sagt gjørdi Gud Ábraham til ættarfaðir jødanna við hesum lyfti. Ábraham hevði átta synir við trimum konum. Tað eru tveir teir elstu synirnir, sum hava søguligan áhuga. Ísmael fekk hann við Hagar, og umleið fimtan ár seinni átti Sára Ísak. Eftir at Sára doyði, gifti hann seg við Keturu, sum gav Ábrahami seks synir, sum ongan søguligan áhuga hava.

Tað snýr seg um Ísmael og Ísak, sum eru ættarfedrar til ávikavist arábar og jødar. Tú hoyrir ongantíð Gud umtalaðan sum Ábrahams, Ísmaels og Jákups Gud. Altíð sum Ábrahams, Ísaks og Jákups Gud – Ísraels Gud. Um hetta fellir tær fyri bróstið, so skalt tú ikki deila meg, men far til Gud og grem teg.

„Allar ættir jarðarinnar skulu fáa signing av tær!" Tað vil siga, øll jørðin skal vælsignast gjøgnum jødafólkið. Tað eru vit blivin gjøgnum JESUS. Frelsan gongur út frá jødunum.

Men nobelheiðursvinnararnir siga okkum eisini okkurt um, hvussu nógv Gud hevur vælsignað jarðarinnar ættir gjøgnum jødarnar.

Ættin hjá Ísaki, jødarnir, eru bara umleið 0,2% av heimsins íbúgvum, men umleið 200 jødar hava fingið nobelheiðursløninina. Ætt Ísmaels, arábar, eru umleið 23% av heimsins íbúgvum, men bara 10 arábar hava fingið nobelheiðursløninina, eitt nú Yasser Arafat.

Lítisvirði eg arábar og upphevji jødarnar? NEI! Eg staðfesti bara, at Gud heldur lyfti sítt, tá ið hann segði, at hann gjøgnum Ábraham og jødiska fólkið hevur vælsignað allar heimsins ættir.

JESUS er sjálvandi signingin yvir allar signingar. Men innan evnafrøði, búskaparfrøði, bókmentir, tónleik, alisfrøði, medisin, tøknifrøði, landbúnað og mangt annað yður tað við

jødiskum nobelheiðursvinnarum, sum vælsigna allar ættir jarðar, hóast jødarnir bara eru 0,2% av heimsins íbúgvum.

*Effie Campbell* umsetti.

# Jesus hevur gjørt sítt

## Hevði eg bara kunnað gjørt mítt

Tað eru mong, sum stríðast við tvørrandi frelsuvissu. Tey kenna seg ikki nóg góð ella nóg andalig. Tey halda heldur ikki, at tey gera nokk fyri Jesus, og so kemur hin ringa samvitskan, sum aftur ávirkar frelsuvissuna.

„Man eg vera ein kristin? Eri eg nóg góður?" Og so stemplar tú teg sjálvan sum ikki ein nóg góður kristin, og sum ein, ið manglar frelsuvissuna.

Tað var ein kona, sum manglaði frelsuvissuna, og sum brúkti hvørt høvi, tá ið ein trúboðari kom á vitjan í meinigheitini at siga undir forbønini í eftir-møtinum: „Jesus hevur gjørt sítt, hevði eg bara kunnað gjørt mítt." Henda vónleysa pástand endurtók hon hvørja ferð ein nýggjur trúboðari kom á vitjan: „Jesus hevur gjørt sítt, hevði eg bara kunnað gjørt mítt." At enda fekk hon greið boð frá tí seinasta trúboðaranum, sum hon segði hetta við: „Hatta er púra skeivt, hatta, sum tú sigur. Jesus hevur ikki gjørt sítt. Hann hevur gjørt títt!!!"

Hatta svarið loysti konuna frá tí manglandi frelsuvissuni. „Hann hevur gjørt títt!!! Vit fara ongantíð at megna at gera okkara. Vit eru heilt bundin av hesum, at Jesus hevur gjørt alt!

Eg eri so glaður, av tí at frelsan ikki er bundin av mínum dagsverki, ella tí eg havi gjørt. Frelsan byggir á tað, Jesus hevur gjørt! Bíblian er krystallklár. Hetta byggir ikki á okkum:

„Tí av náði eru tit frelstir, við trúgv, og tað er ikki tykkum at takka, tað er Guds gáva; ikki av gerningum, fyri at eingin skal rósa sær." Ef. 2,8-9.

Tá ið Jesus hekk á krossinum og endaði verkið við orðunum: TAÐ ER FULLGJØRT – varð frelsuverkið fullført. Eg kann ikki gjalda fyri mína frelsu við egnum gerningum. Eg kann bara siga JA og taka ímóti frelsugávuni í mínum lívi. Restina syrgir Jesus fyri!

Tað, Jesus hevur gjørt, heldur í lívi og deyða! Á HANN byggja vit lív okkara. Tað heldur og gevur frelsuvissu.

*Effie Campbell* umsetti.

# Skulu vit altíð fylgja okkara hjarta?

*Sten Sørensen*

Humanisman hevur sterka ávirkan á samfelag okkara. Hon setir menniskjað í miðdepilin og leggur dent á tær dygdir, sum eyðkenna menniskjað og sigur, at menniskjað hevur virði í sjálvum sær og evni til skilagóða hugsan. Nógv gott er í humanismuni, sum kristindómurin kann taka undir við, men har, sum menniskjað verður í fokus í alheiminum, tekur tað plássið frá Skaparanum. Í humanismuni er tað týdningarmikið at liva, sum kenslurnar siga tær. Humanisman sigur, at menniskjuni eru fræls og ikki undirløgd nøkrum.

Bíblian hevur eitt annað fokus enn humanisman. Hon talar sjálvandi eisini um hjartað: „Fram um alt, ið verður varðveitt, varða títt hjarta, tí at har er tað, at lívið sprettur upp.“ Orðt. 4,23.

Sjálvsagt skulu vit varðveita hjartað. Tí tørvar venjing. Vit mugu verja tað fyri røddir og hugskot uttanífrá. Hjartað verður díkt undir við hugskotum og meiningum alla tíðina.

Men tað kann verða lívshættisligt bara at fylgja hjartanum! Hygg í Matt. 15,19, har sært tú, hvat ið Jesus sigur um hjartað. Hann nevnir óndar hugsanir, manndráp, hordóm, siðloysi, stuldur, rangar vitnisburðar, spottan. Alt hetta kemur úr hjartanum, sigur Jesus.

Jesus segði ongantíð: Fylg tínum hjarta. Men hann segði: **Fylg mær!**

Okkara innskot og hugsanir skulu vit taka til okkara úr Himlinum, ikki bara úr hesi verð. Tí skalt tú ikki bara fylgja tínum hjarta, men fylg eisini Jesusi og hansara livandi orði. Tá fer hansara sjónarmið at ávirka okkara gerandisdag, val og gerningar. Hann vil stutt sagt seta dám á okkara hjarta.

Vit kunnu eisini biðja bønina hjá Dávidi: „Skapa, Gud, mær hjarta reint, gev mær av nýggjum fastan anda mær í brósti!“ Sálm. 51,12.

*Effie Campbell* umsetti.

## SUNNUDAGSSKÚLIN

| | | | | | |
|---|---|---|---|---|---|
| 17. mai | Tekstur: | Dán. 6, 1-25 | bíbliuorð: | Dán. 6,27b |
| 24. mai | Tekstur: | Jóh. 14,1-3; Mark. 16, 19-20 og Matt. 24, 30-31 | bíbliuorð: | Jóh. 14,2a |

**Útgevari:** Hin kirkjuliga heimamissiónin í Føroyum.
**Umbróting & prent:** Control P – tel. 35 77 74




***Nr. 12*** ***31. mai 2020*** ***80. árg.***

# Stýra tonkunum

*„... tað, sum maður sáar, tað skal hann eisini heysta.“ Gal. 6,7.*

At stýra okkara tonkum átti at verið tað verkevnið, ið vit seta ógvuliga frammalaga. Tankar okkara eru sum ein telda, sum bara letur frá sær tær upplýsingar, sum vit hava fylt hana við. Vinnarar – tey menniskju, ið tykjast at ganga sigrandi fram gjøgnum lívið – leggja ógvuliga stóran dent á, at teirra sál og hugur skulu fáa røttu føðina.

Ein vísindamaður er komin fram á og hevur greitt frá eini ógvuliga tunnari membran – einari hinnu – í aftasta parti av heila okkara. Hennara starv er at stýra okkum eftir tí tankanum, sum ræður beint tá í løtuni. Vit gera natúrliga tað, sum fyllir sinn okkara. Um vit lata okkum søkka niður í djúpar tankar um okkurt, so vilja vit seinni ynskja okkum at gera eftir hesum tonkum.

Nú er tað nógv, sum blívur skilligari fyri okkum – til dømis, hví nógvar neyðtøkur fara fram, eftir at menn hava sæð pornografiskar filmir kvøld eftir kvøld. Vit skilja eisini betri nú, hví so nógv ungfólk í aldrinum 12–14 ár fremja grovan harðskap. Í hasum aldursbólkinum hava flestu ungdómar sæð meir enn 4.000 morð í sjónvarpinum, fyri ikki at tala um tað, tey hava upplivað í sínum telduspølum.

Studentarnir á medisinska fakultetinum á fróðskaparsetrinum í Indiana granskaðu, hvussu myndirnar, ið vit síggja, ávirka heila okkara. Til dømis fingu ungdómar, sum høvdu sæð nógvan harðskap, skert síni fatanarevni. Jú meira harðskap tey sóu, jú minni gjørdist tankavirksemi, innlæringin, evnini at

meta um, og kensluliga verjan minkaði eisini. Tann óhumskan, sum tey høvdu fylt sinnið við, ávirkaði teirra hugburð og gerðir. Teirra innara „telda“ hevði goymt skeivar upplýsingar – og nú bar bara til at framleiða nakað vánaligt.

Paulus ápostul kendi einki til teldur; men hann visti um landbúnað: „Tí at tann, sum sáar í holdi sínum, skal av holdinum heysta týning; men tann, sum sáar í andanum, skal av andanum heysta ævigt lív.“ Gal. 6,8. Tað er skilagott at geva sær far um sínar tankar!

*„... et Ord til Dagen“*
*Effie Campbell* umsetti.

# Lyftið um eitt langt lív

*„ ... gera tann máttleysan, sum hevur deyðans veldi.“ Hebr. 2,14.*

Doyggja foreldur tíni, meðan tú ert rættiliga ungur, livir tú kanska í einum ómetaligum ótta fyri, at tú heldur ikki fert at gerast eldri, enn tey blivu. Bíblian sigur, at Jesus var: „ ... noyddur til sjálvur at gerast eitt menniskja av holdi og blóði, fyri at hann við deyða sínum kundi taka valdið frá honum, sum annars var harri yvir deyðanum, nevniliga djevulin. Á henda hátt setti hann menniskju í frælsi, sum annars trælaðu undir deyðaræðslu alla lívsævi sína.“ Hebr. 2,14-15 (frítt endurgivið).

Tá ið títt arbeiði á jørð er fullført, gevur Gud tær eitt heim í himli. Royn eina løtu at síggja títt dreymaheim fyri tær, og minst so til orðini: „ ... ólíka nógv betri.“ Fil. 1,23. Veitst tú, hvør ið er arkitektur, sniðgevi og byggiharri? Jesus segði: „Eg fari burtur at tilbúgva stað fyri tykkum.“ Jóh. 14,2.

Tú kanst stytta um lív títt, um tú ert ólýðin móti Gudi; um tú ærir hann, leingir tú harafturímóti um lívið. Hizkia kongur prógvaði henda sannleikan. „Tá snúði hann andliti sínum móti bróstinum og bað soleiðis til Harran: „Á, Harri, minst tó til, hvussu eg havi gingið fyri ásjón tíni í trúfesti og av heilum huga og gjørt tað, ið gott er í tínum eygum!“ Og Hizkia græt sáran.“ 2. Kong. 20,2-3.

Gud svaraði hasari bønini: „Áður enn Jesaja var komin út um forgarðin, kom orð Harrans til hansara soljóðandi: „Snúgv aftur og sig við Hizkia, høvdinga yvir fólki mínum: Harrin ... hevur hoyrt bøn tína ... Eg man grøða teg; í ovurmorgin manst

tú fara niðan í hús Harrans. Eg vil leggja fimtan ár aftur at lívi tínum." 2. Kong. 20,4-6.

Grøðir Gud eisini í dag? Heilt avgjørt! Jákup skrivar: „Er nakar sjúkur tykkara millum, tá kalli hann til sín hinar elstu kirkjuliðsins, og teir skulu halda bøn yvir honum og salva hann við olju í Harrans navni; og trúarbønin skal gera hin sjúka frískan, og Harrin skal reisa hann aftur á føtur ..." Ják. 5,14-15.

Statt á Guds orði, um tú ert bangin at doyggja. „Við longum lívi skal Eg metta hann og lata hann skoða frelsu Mína." Sálm. 91,16. V.D.

*„ ... et Ord til Dagen"* *Effie Campbell* umsetti.

# Góð andalig føði

Nógv av tí, vit síggja í sjónvarpinum, er harðskapur, hor og morð. Hetta er spilt og rotin andalig føði. Tað, vit fylla okkum við, kemur at mynda okkum.

Ein maður talaði niðri á Blákrosskaféini. „Í síðstuni havi eg fingið mær nakað fyri," segði hann. „Hvørt kvøld, tá ið eg leggi meg, lurti eg eftir onkrari talu á YouTube. Nú eitt kvøldið lurtaði eg eftir Hans Berntsen. Hann helt eitt møti í Haderslev, haldi eg, at tað var. Eftir møtini plagdi hann altíð at biðja fyri sjúkum. Hann segði í taluni, at hann einaferð bað fyri einum manni, sum hevði havt heilabløðing og hevði verið lammaður í høgru síðu í fleiri ár. Maðurin kom seinni aftur til Berntsen, hann var blivin fullkomiliga frískur. Hans Berntsen hevði eisini biðið fyri einum manni, sum hevði ein krabbavøkstur á heilanum. Eisini hesin maður bleiv púra frískur.

Halleluja! Tað, sum er so gott við Berntsen, er, at hann ger tað so einfalt. Hann sigur, at hann kann ikki grøða nakran. Tað er bara Gud, sum kann tað. So biður hann eina stutta bøn upp til Harrans um grøðing. Verður persónurin grøddur, so er tað **bara** Harrin, sum eigur æruna fyri tað og eingin annar. Øll blíva ikki grødd; men fyri tað skulu vit ikki gevast at biðja, tí Jesus segði, at vit skulu biðja, og so ger hann, sum hann sjálvur sær er best.

Í 1979 bleiv eg frelstur, og hetta árið var Emanuel Minos í Føroyum, og tað er einasta ferð, at hann hevur verið her. Eg havi eisini fingið mær tað fyri, at byrja morgunin við onkrari

andaligari talu á YouTube t.d. av Emanueli Minos. So liggi eg og lurti undir dýnuni, og eg eri ofta øgiliga linur og minnist kanska einki aftur av tí, sum sagt varð; men orðini blíva kodað inn í heilan og leggja seg í undirvitskuna, og eg fái gott av tí kortini, tað merki eg týðiliga, tí tað, sum kemur inn gjøgnum oyrað og eygað, myndar okkum," endaði maðurin.

*Effie Campbell.*

# Gud sigur um Ísrael:

**1. Landið er mítt**. Tað eri eg, sum eigi Ísrael.: „Jørðin má ikki verða seld med alla, **tí hon er mín**, og tit eru bert útisetar og niðursetumenn hjá mær." 3. Mós 25,23.

**2. Býurin (Jerusalem) er mín:** „Men Eg (Gud) útvaldi Jerusalem, navni Mínum til bústað." 2. Krøn. 6,6. V.D.

**3. Fólkið er mítt:** „Hvør, ið nertur tykkum, nertur mín eygnastein!" Zak. 2,12.

Ísrael er einasta landið á jørð, sum hevur fingið ítøkilig landlyfti í Bíbliui. (2. Mós. 23,31 og 4. Mós 4 og 5. Mós. 11,24).

Tað var Ísrael, sum fekk lyftið um ein Frelsara. Luk. 2,11.

Ísrael er einasta landið, sum hevur fingið lyftið um eina kollektiva frelsu: „Og so skal **alt** Ísrael verða frelst." Róm. 11,26.

*Effie Campbell.*

# Ger íløgur í mannasálir

Vit hava etið av tí skeiva trænum, kunnleikans træi (1. Mós. 2,9). Lívið sprettur innanífrá. Vit mugu investera, gera okkara íløgur, í tað innara menniskja, tí tað er tað, sum framleiðir ævigt lív. Vit mugu hvønn dag fylla okkum innan við Guds orði. Higartil hava vit gjørt okkara íløgur í tað ytra menniskja, í smyrsl og klæði í rúgvutali. Í einum ørindi stendur tað soleiðis: „Du pynter og pryder din arme krop, som padder og orme skal æde op." Latið okkum eta av lívsins træi og gera okkara íløgur í mannasálir, tí tær skulu liva ævigt.

*Effie Campbell* umsetti.

## SUNNUDAGSSKÚLIN

| | | | | | |
|---|---|---|---|---|---|
| 31. mai | Tekstur: | Áps. 2,1-18 og Jóhs. 14,26-27 | bíbliuorð: | Jóh. 14,26b |
| 7. juni | Tekstur: | Áps. 9,1-19 | bíbliuorð: | Mark. 16,15c |

**Útgevari:** Hin kirkjuliga heimamissiónin í Føroyum.
**Umbróting & prent:** Control P – tel. 35 77 74